# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800



*Meistaraliðini tey bæði seinastu árini verða roknað sum nøkur av bestu boðunum upp á ein komandi meistara, og tí er talan um spennandi styrkisroynd við Margáir*

# Favorittarnir takast

**Meðan oddaliðið eftir fyrstu trý umførini spælir móti botnproppinum, skulu tey fýra, sum av teimum flestu verða spádd at enda ovast, dystast innanhýsis**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan tykist á pappírinum at vera um satt kanón-umfar, sum stendur fyri framman í Vodafone-deildini.

Eftir fyrstu trý umførini er B36 einsamalt á odda við fullum stigatali, og á pappírinum eru møguleikarnir góðir at halda fast um støðuna, tá teir spæla móti 07 Vestur.

Uppflytararnir úr Vágum hava enn ikki fingið nakað stig, men í løtum hevur spælið verið á serstakliga góðari leið, og tí er so als ikki vist, at oddaliðið hevur nakra lætta uppgávu í Sørvági.

### Favorittarnir

Undan kappingini varð frá fleiri síðum sagt, at EB/Streymur, HB, Víkingur og NSÍ vóru bestu boðini upp á ein komandi føroyameistara, og tí er talan um eitt slag av framskundaðari próvtøku, nú tey fýra takast í innanhýsis uppgerðum.

Í Havn er HB mest sum altíð favorittur, men fyrst GÍ og nú Víkingur hava ofta fingið sera góð úrslit við sær úr høvuðsstaðnum móti júst HB. Úrtøkan hjá báðum liðunum hevur verið á eini leið higartil, men skulu tey veruliga hanga í oddinum eftir hetta umfarið, ræður um ikki at tapa.

Og støðan er tann sama í dystinum millum meistaraliðini tey bæði seinastu árini, EB/Streym og NSÍ.

### Áhugavert í botninum

Og so kann bara staðfestast, at eisini teir báðir seinastu dystirnir hetta umfarið eru av serstakliga áhugaverda slagnum.

Í Klaksvík snýr visiónstosið seg ikki longur um nakað FM-heitið, men heldur um at byggja eitt nýtt lið upp, og higar til hevur gingið hampuliga væl við hesum. Tvey stig eru tó í minna lagi, og tí eru vónirnar, at fyrsti sigurin á árinum kemur sunnudagin, nú AB vitjar. AB fekk hinvegin sín fyrsta sigur fyri viku síðani, og hetta er sjálvandi nakað, sum teir vilja byggja víðari á.

Og í Fuglafirði ræður um hjá heimaliðnum at vinna á lítlu kreppuni, sum felagið er endaði í. Undan kappingarbyrjan var málið at koma heilt upp har, sum tað er stuttligt at kappast. Men einki stig eftir trimum umførum bendir so als ikki á nakað sum helst tos um oddasess.

# Dystaryvirlit

### Vodafone-deildin

| | | |
|---|---|---|
| 26.04 | HB-Víkingur | Lars Muller |
| 26.04 | EB/S-NSÍ | Páll Augustinussen |
| 26.04 | KÍ-AB | Dagfinn Olsen |
| 26.04 | 07 V-B36 | Ransin N. Djurhuus |
| 26.04 | ÍF-B68 | Eiler Rasmussen |

### 1. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 25.04 | VB/S-Skála | Bárður Mortensen |
| 25.04 | Víkingur-B71 | Andrew Christiansen |
| 25.04 | B68-NSÍ | Georg N. Rasmussen |
| 25.04 | FC Hoyvík-TB | Høgni Hansen |
| 25.04 | MB-HB | Alex Troleis |

### 2. deild menn

| | | |
|---|---|---|
| 26.04 | 07 V-B36 | Allan Manai |
| 26.04 | B71-AB | Eugen Voda |
| 26.04 | EB/S-Undri | Birgir Joensen |
| 26.04 | Víkingur-TB | Karl M. Poulsen |
| 26.04 | ÍF-KÍ | J. M. Kjell |

| | d | v | - | j | - | t | v mál | t mál | +/- | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 B36 | 3 | 3 | - | 0 | - | 0 | 6 | 3 | 3 | 9 |
| 2 Víkingur | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 10 | 4 | 6 | 7 |
| 3 NSÍ | 3 | 2 | - | 1 | - | 0 | 7 | 3 | 4 | 7 |
| 4 EB/S | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 5 | 2 | 3 | 6 |
| 5 HB | 3 | 2 | - | 0 | - | 1 | 5 | 3 | 2 | 6 |
| 6 AB | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 4 | 4 | 0 | 3 |
| 7 B68 | 3 | 1 | - | 0 | - | 2 | 2 | 6 | -4 | 3 |
| 8 KÍ | 3 | 0 | - | 2 | - | 1 | 3 | 4 | -1 | 2 |
| 9 ÍF | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 1 | 6 | -5 | 0 |
| 10 07 Vestur | 3 | 0 | - | 0 | - | 3 | 4 | 12 | -8 | 0 |

# Abraham hyggur at ÍF

**Í vikuni hevur eitt nýtt andlit verið at sæð til venjingarnar hjá Vodafone-hópinum hjá ÍF. Nevnliga andlitið á Abraham Løkin**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Tríggir dystir og einki stig hevur fingið krepputosið at tutla spakuliga fram í Fuglafirði, men enn er ikki talan um nakrar reyðar lampur hjá venjaratoyminum.

- Eg veit ikki, hvat tú skalt rópa tað, men Abraham er í løtuni eitt slag av sparringspartnara hjá mær, sigur Jón Simonsen, venjari hjá ÍF.

- Vit kennast væl, og vit eru báðir í ferð við at taka seinasta partin av venjaraútbúgvingini. Fótbóltsliga hugsa vit eisini rættiliga eins, og tá eg noyddist av landinum undan kappingarbyrjan í fjør, skeyt eg sjálvur upp, at ÍF heitti á Abraham um at standa fyri liðnum, til ein varandi loysn varð funnin, sigur Jón Simonsen.

- Og nú havi eg so heitt á hann um at fylgja við í venjingunum hjá okkum. Tá tú soleiðis endar í einum aldudali, kanst tú sum venjari hava lyndi til at stara teg blindan upp á nøkur ting, og tí kann tað vera, at eitt nýtt par av eygum kann finna onkrar aðrar loysnir enn tær, sum eg havi roynt, sigur Jón Simonsen.

Formliga er Abraham ikki í nøkrum starvi hjá ÍF, og Jón Simonsen sigur, at tað fyribils bert er hesa einu vikuna, at hann gevur sín íblástur.